# Stuðulskonsert á Margarinfabrikkini

**Fríggjakvøldið 8. og leygarkvøldið 9. juli verða rokkkonsertir í Margarinfabrikkini**

TÍÐINDASKRIV

Tað er ART / Spren Rex, sum skipar fyri hesum tiltøkum til tess at fyrireika framførslurnar hjá fleiri av bólkunum á G Festivalinum.

Her er talan um tað nýggjasta og mest spennandi innan føroyskan rokktónleik.

The Dreams eru ávegis upp eftir tindunum m.a. í MTV. Men fyrstu stig teirra vóru sjálvandi í rokkmiðdepli Føroya í Magnus Heinasonargøtu í Havn.Við teirra glaða upptempo slagi av punki ætla teir at seta dám á konsertirnar.

Paradox nokk kendasti ungpunkbólkurin í landinum verða eisini við og teir fara at skrúva frá soleiðis, at onki eyga er turt.

Synerchy fara við sínum villu tónum og melodiska Gothic rokk at skapa sín egna stemning.

The Headliners eru einasti bólkur enn, sum blandar D J og rokk, í einum sera spennandi blandi, sum rokkar totalt.

The story ends, sum hevur sín heilt egna stíl, skal og má upplivast.

Fake it er ein spildurnýggjur gentubólkur, sum traðkar á pallin fyri fyrstu ferð.

Three Colours er ein nokk so nýggjur regeabólkur, sum fær dansigólvið at brenna.

Øll tey, sum keða seg í Havn hesi bæði kvøldini, eiga at hyggja framvið Margarinfabrikkina. Tí har er tað einasta staðið í Føroyum, har originalur Føroyskur framtíðartónleikur verður framførdur.

So ver við til at stuðla Rokkinum og øllum hinum við at koma til konsertirnar Fríggjakvøldið og Leygarkvøldið.




*Fleiri spennandi bólkar eru á skránni, tá Margarinfabrikkin hevur konsert um vikuskiftið*

# Natasha og Vanja fáa fullan stuðul frá bygdaráðnum

**Bygdaráðið í Hvalba átalar harðliga, at borgarar í kommununi hevur bíðað meiri enn eitt ár eftir svari úr innlendismálaráðnum og bygdaráðið mælir eisini til, at tey fáa uppihaldsloyvi í Føroyum**



*Í royndunum at sleppa at verða verandi í Føroyum, fáa Natasha Vukotic og dóttir hennara, Vanja, nú fullan stuðul frá bygdaráðnum*

ÚTLENDINGA-POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Natasha Vukotic í Hvalba og 11 ára gamla dóttir hennara, Vanja, eru nú blivin eitt mál í bygdaráðnum í Hvalba.

Í Sosialinum í farnu viku fortaldu vit, søguna um Natashu úr Jugoslavia, sum er enn eitt dømi um syndarliga útlendingapolitikkin í Føroyum.

Tað er nú meiri enn eitt ár síðani, at Natasha søkti um at fáa arbeiðsloyvið í Føroyum longt, men enn hevur hon hvørki hoyrt orð ella eið aftur úr innlendismálaráðnum og nú stúrir hon fyri, at hon og dótturin verða rikin av landinum.

Hetta hevur fingið bygdaráðið í Hvalba at ressast og at taka málið til viðgerðar.

Á fundi í bygdaráðnum týskvøldið, samtykti bygdaráðið einmælt at senda innlendismálaráðnum eina harðliga átalu fyri at tað skal hava tikið so langa tíð at avgreiða umsóknina.

Bygdaráðslimir vita, at teir ongan myndugleika hava, men bygdaráðið samtykti eisini einmælt at viðmæla, at Natasha og Vanja sleppa at verða verandi í Hvalba.

Bygdaráðslimir vístu á, hvussu væl tey eru fallin til í Hvalba og tey hildu tað verða stóra synd at koyra tey av landinum aftur.

Serliga hildu bygdaráðslimir, at tað hevði verið eina vanlukku fyri dóttrina Vanju, sum er 11 ár og sum hevur búð næstan átta ár av sínum lívi í Føroyum og tey seinastu seks árini hevur hon búð samanhangandi í Hvalba og tí kennir hon ikki til nakað annað heim.

# Meira enn 3.000 fólk á G! higartil

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 1. juli endaði serliga forsølutilboðið uppá vikuskiftispass til G! 2005 og fleiri ábendingar vóru í vikuni um, at sølan fór at verða metstór. M.a. høvdu fleiri sølustøð ringt eftir fleiri atgongumerkjum, tí útselt var. Fríggjadagin var so gjørt upp, hvat var selt síðan 8 mai. Og tað kann staðfestast, at atgongumerkjasølan hevur gingið væl betur enn væntað. Alt í alt eru væl omanfyri 3.000 fólk longu nú, sum koma á G!, tá Gøtufólk, tónleikarar og børn verða roknað við.

Sølan í ár er sostatt mundandi størri enn í fjør, og heldur sami vøkstur fram móti festivalbyrjan, sum higartil í ár, so verður útselt – helst áðrenn, ella í øllum førum undir festivalinum. Í mesta lagið 5.000 fólk verða loyvd inn á økið í senn.

Hósmorgun í seinastu viku boðaðu vit frá, at tjaldingin hevði sett met mikudagin við 80 bíleggingum eftir einum degi. Men hósdagur-in sló so dyggiliga metið frá degnum fyri. Omanfyri 200 bíleggingar vóru til tjalding á G! bara hósdagin. Tilsamans vóru omanfyri 300 bíleggingar til tjalding í seinastu viku. Plássini ganga skjótt undan, so tað ræður um at bíleggja sum skjótast. Bílegging fer fram á camping@gfestival.com ella við at ringja 441653

Heimasíðan eisini metstóra vitjan

Metstóri áhugin fyri G! Festival sæst eisini aftur á internetinum. Almenna heimasíðan hjá G! www.gfestival.com setti við 53.000 vitjanum fyri ein mánað nýtt met í juni. Hesar 53.000 vitjaninarr skulu samanberast við 19.000 fyri juni mánaða í fjør og 37.000 í juli mánaða í fjør, sum var besti mánaðin seinasta ár.Men tað metið frá juli í fjør bleiv sligið longu í apríl í ár við tilsamans 48.000 vitjanum.



Flogmekanikara lærlingur til Atlantic Airways

Kundi tú hugsað tær at sloppið í læru sum flogmekanikari? So hevur tú møguleikan nú.

Atlantic Airways tørvar ein flogmekanikara til teknisku deild, har høvuðsuppgávan er at hava eftirlit við og umvæla flogfør og tyrlur hjá felagnum. Í løtuni starvast 21 fólk á teknisku deild. Av teimum eru 15 mekanikarar, har 2 eru lærlingar.

Vit sóknast eftir einum ábyrgdarfullum og álítandi persóni, sum bæði er fyrikomandi og raskur. Tekniskur førleiki er ein fyrimunur.

Send eina umsókn, har tú sigur eitt sindur um teg sjálvan, hvat tú fæst við, og hvørjar arbeiðsroyndir, tú hevur. Fortel okkum, hví tú heldur, at akkurát tú skalt gerast okkara nýggi flogmekanikari.

Útbúgvingin til flogmekanikara tekur fýra og eitt hálvt ár. Umleið helvtin av tíðini er skúlagongd, sum gongur fyri seg í Danmark á Luftfartskúlanum í Dragør. Talan er um eina altjóða útbúgving, sum kann brúkast um allan heim. Tá ið útbúgvingin er liðug ber til at serútbúgva seg innan fyri ávís sløg av flogførum og tyrlum.

Fært tú kjansin, skalt tú byrja 1. august 2005. Merk umsóknina "flogmekanikaralærlingur" og send hana til: Atlantic Airways, att. William Smith, FO-380 Sørvági. Umsóknarfreistin er 11. juli.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com